Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo

Landssjúkrahúsið



# Til makan

## Til makar, sum verða innlagdir við mammu og barni fyrstu náttina

### Tillukku við barninum!

Eins og mamman hevur tú eisini ein sera týdningarmiklan leiklut í øllum viðurskiftum, sum viðvíkja barninum—bæði tá tað snýr seg um bróstageving og onnur praktisk viðurskifti.

Bróstagevingin er ein felags ábyrgd, og tískil mæla vit til at tú eisini setir teg inn í grundleggjandi vitan/kunning um bróstageving, og hvat skal til fyri at fáa eina væleydnaða bróstageving.



Vit vilja gera okkara til, at tú fært møguleikan at læra barn títt at kenna frá byrjan, umframt at stuðla og vera um mammu og barn. Serliga í sambandi við bróstageving er umráðandi, at tú stuðlar mammuni, tí kanningar vísa, at bróstagevingin eydnast betri, um makin stuðlar.

Vit fara at bjóða tær at verða innløgd/innlagdur saman við mammu og barni í eina nátt. Orsaka av at umstøðurnar á deildini ikki eru tær bestu, vilja vit heita á teg um at vera umhugsin og taka atlit til hini innløgdu á deildini.

### Vælkomin  at vitja

Tú ert vælkomin at vitja mammu og barn allan dagin (millum kl. 9-22) og hevur soleiðis møguleika at vera við at ansa barninum, læra tað at kenna osfr. Tú kanst vera við til innleggingarsamrøðu, barnavask og aðra vegleiðing, sum vit geva á deildini.

Um fleiri liggja á stovuni, vilja vit heita á tykkum um at vísa umhugsni fyri hvørjum øðrum. Ynskiligt er, at makar **ikki** eru á stovuni eftir kl. 21.
Í hvílitímanum millum kl. 13.-15.00 mæla vit til, at allir makar fara úr av stovunum og møguliga ansa eftir barninum, meðan mamman hvílir.



### Ymiskt praktiskt

Morgunin eftir at tú hevur sovið her, ert tú vælkomin at fáa tær morgunmat á deildini. Døgurði, nátturði og drekka eru bert ætlað mammunum. Tú ert vælkomin at keypa tær mat í forhøllini og taka hann við á deildina.

### Serligar umstøður

Serlig viðurskifti s.s. sjúka o.a. kunnu gera, at einstakir makar hava í boðið at verða innlagdir í longri tíð saman við mammu og barni.

### Upplatingartíðir hjá Sølubúðini í forhøllini

Gerandisdagar: kl. 8-20.00
Leygar-, sunnu- og halgidagar: kl.14.30 – 20.00